# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar



*21. februar fingu Sanna og Jákup eina lítla systur, sum eitur Ester. Hon var 52 cm long og vigaði 3500 gr. Foreldur teirra eita Rannvá H.og Dávid R. Davidsen.*



*25. februar fingu Annika Jónsveinsdóttir og Ragnar Nolsøe, Aalborg, ein son. Hann vigaði 4230 gr og var 55 cm langur.*

12. februar fingu Brynhild og Óli Viðbjørg, Klaksvík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4250 gr.

13. februar fingu Estrid Kristensen og Arne Johansen, Trongisvági, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4120 gr.

14. februar fingu Marjun og Kayo Sørensen, Eiði, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3900 gr.

19. februar fingu Guðrun M. og Jógvan Páll Steinberg, Tórshavn, ein son. Hann var 49 cm langur og vigaði 2960 gr.

19. februar fingu Annleyg Hansen og Jógvan Poulsen, Strondum, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3735 gr.

19. februar fingu Sóleyð Ísaksdóttir Hermansen og Jan Mohr Hermansen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3850 gr.

20. februar fingu Jóna Dulavík Olsen og Poul Anker Zachariasen, Skála, eina dóttur. Hon var 47 cm long og vigaði 2500 gr.

20. februar fingu Noomi og Rúni Rasmussen, Strondum, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3500 gr. Hon eitur Rakul Maria.

21. februar fingu Karen Johansen og Ronny L. Olsen, Rituvík, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3450 gr.

21. februar fingu Jastrid K. E. Fuglø og Kim Hansen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 48 cm long og vigaði 2750 gr.

22. februar fingu Helena og Saviour Mifsud, Agjum, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 2900 gr.

22. februar fingu Mary Joy og Dan Thomsen, Svínáir, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3250 gr.

24. februar fingu Marjun Vatnhamar og Francis Bell Keypmannahavn ein son, hann vigaði 3400 gr. og var 50 cm langur.

24. februar fingu Elin Hansen og Jan Erik Pedersen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3725 gr.

25. februar fingu Lív Vihelmsen, Sandavági, og Eyðun Gaard, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3700 gr.

26. februar fingu Fríða Marjunardóttir og Dávur Magnussen, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3920 gr.

## Til minnis um elskaðu ommu mína

# Poulu Jespersen

**F. 24. juni 1919 - d. 30. des. 2008**



Tað er við stórari sorg, at eg siti og skrivi nøkur orð um teg. Tú var so yndislig, blíð, góð og gávumild kona - tann besta omma ein kann hugsa sær.

Tú var eisini so myndarlig í hondunum, dugdi væl at seyma. Tað sást í heimi tínum, vakrar heimaseymaðar gardinur fyri vindeygað og allar teir vøkru kjólarnar, sum tú seymaði okkum gentunum. Eg minnist biltúrarnar inn í plantasjuna við okkum systkinabørnunum, har tú spældi grýla og vit runnu skríggjandi undan. Halgurnar, har eg og systir mín svóru inni hjá tær á bóli, og abbi kom við einum drekkamunni, tað var so stuttligt.

Eg var so fegin, tá tú kom til Íslands við pensiónistunum í 2004 og kom at vitja meg.

Tú og abbi vóru ein so stórur partur av lívi mínum. Tit vóru so góð við meg og eg við tykkum - eg fari at sakna tykkum bæði sárt. Tað verður tómligt at koma heim í summar, inn í hús tykkara og vita, at nú er ongin at taka ímóti einum.

Nú ert tú komin upp í himmalin, upp til abban, sum tú misti fyri hálvumøðrum ári síðani. Tú saknaði hann so nógv. Tit vóru gift í 68 ár.

Eg eigi so nógv góð minni um teg, sum eg altíð vil goyma í hjarta mínum.

*Eg til Jesus fari*
*leggi hond í hans.*
*Trygt og væl hann leiðir,*
*meg til Himmallands.*

Hvíl í friði góða omma.

**Ommudótturin Poula í Íslandi**

# Andrias Nielsen 90 ár



Leygardagin 28. februar verður Andrias Nielsen í Sandavági 90 ár. Foreldur Andriasar vóru Ata fødd Mouritsen úr Sørvági og Niels Jacob Nielsen úr Sandavági, pápan misti Andrias, tá hann var 2 ára gamal. Andrias giftist Fíu í 1942, Fía Johansen var eisini úr Sandavági, hon doyði í 1991, børn teirra eru Ninna, Tóra og Jóanis, sum øll búgva í Sandavági, abbabørnini eru 11 og langabbabørnini eru 17 í tali.

Andrias fór sum blaðungur til skips, tá við deyðsiglara, hann tók skiparaútbúgving í 1942, silgdi mest við trolarum, nevnast kunnu Venus, Stella Argus, Jóannes Fonsdal, Magnus Heinason, Gadus í Norra, Hamrafossi, Research og seinast við rækjutrolaranum Norðstjørnuni, har hann var sín seinasta túr til skips í 1984. Í bókini "Skakandi tilburðir" greiðir Andrias frá hendingum á sjónum, m.a. tá hann fór fyri borð av Gadus og lá í sjónum í umleið ½ tíma, tað var hálvmyrkt tá hendingin fór fram uppi við Bjarnoynna, men tíbetur spældi tað væl av.

Tá Andrias, eftir at hava silgt í útvið eina hálva øld, legðist uppi í 1984, fór hann at arbeiða á flakavirkinum Snarfrost, har hann arbeiddi í saltfiskinum, til hann gavst sum 67-ára gamal.

Sum frítíðarítriv fekst hann við at hava heimaseyð, tað hevði hann so leingi, sum hann orkaði at fáast við tað.

Andrias lesur nógv, fylgir væl við hvat fyriferst í samfelagnum, er sera áhugaverdur at práta við, minnist væl og kann tí greiða frá nógvum, heilt aftur til barnaárini.

Tey seinastu árini hava beinini svikið, sinnalagið hevur altíð verið gott og er tað enn, tveir dagar um vikuna er hann til ítriv á Sýnini, sum hann er sera glaður fyri.

Nú Andrias rundar tey níti verður ynskt honum hjartaliga tillukku við degnum.

**j.**